Sosialurin

Nr. 210 - 3. november 2009

# »Okkara bindibók« – eitt øðrvísi stuðulstiltak

**Í hesi vikuni kemur forvitnislig bindibók út við bindi- og hekliuppskriftum til børn og vaksin umframt nøkrum uppskriftum til dukkur, bamsur og hundar**

TÍÐINDASKRIV

Tað er unga Lamba-kvinnan Sunneva Mohr, ið hevur staðið fyri bókini. Talan er um eitt stuðulstiltak, har allar inntøkur fara óskerdar til barnaheimið "Char Fasson Orphanage" í Bangladesj.

Sunneva Mohr, ið er útbúgvin námsfrøðingur, hoyrdi um barnaheimið frá eini vinkonu, ið starvast fyri ein altjóða felagsskap í Bangladesj. Umstøðurnar hjá dreingjunum rørdu hana djúpt og hon setti seg í samband við barnaheimið. Hetta gjørdist byrjanin til eitt samstarv, ið hevur við sær, at Sunneva Mohr fer til Bangladesj at vitja barnaheimið í november.

### Um barnaheimið

Barnaheimið "Char Fasson Orphanage" liggur í sunnara partinum av Banglahesh í einum øki, sum nevnist Bhola. Umstøðurnar at dyrka jørðina í hesum øki eru vánaligar, og økið er millum tey fátækastu og minst mentu í øllum landinum.

Barnaheimið varð bygt í 1972, eftir at ein flóðalda hevði kravt hundraðtúsundtals mannalív í 1970. Tað búgva umleið 100 dreingir í aldrinum 6-16 ár á barnaheiminum. Dreingirnir hava antin mist annað ella bæði foreldrini, ella hava foreldrini ikki ráð/møguleika at hava teir búgvandi heima. Sjey starvsfólk eru knýtt at heiminum. Fleiri av starvsfólkunum og eisini leiðarin á heiminum hava sjálv búð á barnaheiminum. Haraftur arbeiða sjálvboðin fólk ymsastaðni úr heiminum á Char Fasson Orphanage. Starvsfólkið arbeiðir nærum alt samdøgrið fyri sera lítla løn.

Barnaheimið verður rikið við stuðli frá stjórnini í Bangladesh, men av tí at fíggjarligi stuðulin er so lítil, eru umstøðurnar hjá dreingjunum sera vánaligar. Dreingirnir sova saman tveir og tveir í einkultum songum, hurðarnar kunnu ikki læsast, og ongir rútar eru í vindeygunum. Barnaheimið hevur ikki lagt inn vatn ella vesi. Matur er heldur ikki nógvur av. Dreingirnir fáa tríggjar smáar máltíðir um dagin, við eitt sindur av rísi og grønmeti.




Hóast umstøðurnar eru vánaligar, eru dreingirnar sera takksamir fyri tað, teir hava, og teir vita, at búðu teir ikki á barnaheiminum, hevði støðan verið munandi verri. Barnaheimið leggur stóran dent á, at dreingirnir skulu ganga í skúla og nema sær útbúgving. Dreingirnir hjálpa eisini til við at dyrka jørðina, sum hoyrir til barnaheimið.

Til ber at lesa meira um barnaheimið og síggja myndir á: *http:// charfassonchildrensfund.org/*

### Vinningurin av »Okkara bindibók«

Fyrireikararnir av tiltakinum hava avgjørt, at ein partur av vinninginum av "Okkara bindibók" fer til barnaheimið skjótast gjørligt. Hesin peningur skal nýtast til mat og klæðir til dreingirnar. Restin av vinninginum fer í ein grunn, ið er stovnaður til endamálið. Barnaheimið kann síðani søkja um pening úr hesum grunni til ymiskar verkætlanir.

Vælvildin hevur verið ótrúliga stór, og bæði einstaklingar, fyritøkur og handlar hava stuðlað tiltakinum á ymsan hátt. Tey ið hava fyrireika tiltakið eru sera fegin og stolt um úrslitið og vóna at „Okkara bindibók" kann vera til íblástur, samstundis sum tiltakið vónandi kann vera við til at bøta um livikorini hjá børnunum á Char Fasson Orphanage".

Bókin kostar 100 krónur, og fæst til keyps í flest øllum tógv handlum í landinum.

Tað er "FOTOSTUDIO" við Finni Justinussen og Per á Hædd, og "FRAMEFOTO" við Bárður lydersen ið hava tikið tær sera góðu myndirnar ið eru í bókini. Elisabeth M. Danielsen og Annika Poulsen frá vælverustovuni "Monroe", hava gjørt hár og make-up hjá modellunum.

# Nýggjar myndir av Madeleine

**Bretska løgreglan hevu almannakunngjørt myndir av teirri horvnu Madeleine McCann soleiðis, sum hon sannlíkt sær út sum seks ára gomul**

KRIMIMÁL

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Bretska løgreglan hevur almannakunngjørt nýggj telduanimeraðar myndir av



Madeleine McCann sum hon sannlíkt sær út í dag, er hon á lívi.

Child Explotation and Online Protection Centre (CEOP) hevur almannakunngjørt myndirnar í einum video á YouTube.

CEOP vónar, at nýggja áheitanin fær fólk, ið eru nær tengd at møguligu burturførarunum av Madeleine gera vart við seg.

- Vit vita, at onkur finst, sum veit, hvør hevur við burturflytingina at gera. Veit tú, hvør tað kann vera, er ongantíð ov seint at gera tað rætta, sigur CEOP stjórin, Jim Gamble.

Videoin finst á sjey tungumálum, og ein av myndunum vísr eina sólbrenda Madeleine, tí hon kann møguliga hava hendan húðalitin, um hon er burturflutt til Suðureuropa ella Norðurafrika.

Madeleine McCann hvarv 3. mai 2007 frá portugisiska frítíðarbýnum Praia da Luz á Algarvestrondini, har hon var og ferðaðist við familjuni.

Foreldrini, Gary og Kate McCann, eru framvegis sannførd um, at dóttir teirra enn er á lívi, skrivar Ekstra Bladet.

# Kunningarfundur um íverksetan í Miðlahúsinum

**Seinnu árini hevur orðið íverksetan verið nógv at hoyra, ikki bara í Føroyum men í øllum vesturheiminum. Íverksetan verður mett at hava stóran týdning fyri dynamikk og vøkstur í einum samfelagi**

ÍVERKSETAN

Íverksetan er nógv. Oftast verður víst til enska heiti entrepreneur, og tá verður í breiðum týdningi hugsað um at byrja okkurt nýtt. Vit hava ikki eina nágreiniliga staðfesting av hvat íverksetan er, men vanliga verður tað brúkt um at byrja nýtt vinnuligt virksemi. Ein íverkseti er her ofta ein, sum hevur eitt nýtt hugskot, sum skal gerast til veruleika. Men ein íverkseti, kann eisini verða eina sum byrjar virksemi, sum tørvur og/ella marknaður er fyri. Við støði í hesum kann sigast at íverksetan er nýtt vinnuligt virksemi.

Seinastu árini hevur serligur dentur verður lagdur á vakstraríverksetar. Vakstraríverksetar vaksa skjótt og skapa harvið nógv nýggj arbeiðspláss og eisini vinnumenning. Tí hevur seinni árini serlig orka verið løgd í at skapa best møguligu umstøðurnar fyri vakstraríverksetum, m.a við at hava íverksetaraumhvørvi saman við fyritøkum og útbúgvingar- og granskingarstovnum.

### Taka váða

Íverksetan er merkt av váða og ein íverkseti kann sigast at verða ein, sum torir at taka váðan við at arbeiða við einum hugskoti, uttan at hava tryggu lønina, sum eitt fast starv gevur. Tí er tað oftast bæði krevjandi og váðið at verða íverkseti, líkamikið um talan er um ein vakstraríverkseta ella ein "vanligan" íverkseta. Tí síggja vit eisini, at nógvir íverksetar ikki eru í gongd meira enn tvey trý ár og at serliga uppbyggjandi byrjanarskeiðið er hart og krevjandi.

Íverksetan verður av fleiri mett at hava sera stóran týdning fyri nýskapan í einum samfelagi, og tí verður mett týdningarmikið at hava góðar karmar fyri íverksetan. Men íverksetan er ikki bara at fáa eitt gullkorn, søkja patent og so liva av rentum restina av lívinum. Íverksetan er hart arbeiði, eydna og dugnaskapur til at m.a. at fáa onnur loysa uppgávur fyri seg, sum ikki hoyra til kjarnuførleikarnar hjá íverksetaranum sjálvum. Ofta hevur tað stóran týdning at hava eitt gott netverk at heita á og at sparra við, sum í besta mun kann menna og geva møguleika fyri at íverksetin tekur røttu avgerðirnar tey røttu tíðarskeiðini og at raðfesta og leggja til rættis.

### Íverksetan stóran týdning

Vit vita, at íverksetan hevur alstóran týdning fyri nýskapan og dynamikk, men eisini at flestu íverksetar ikki yvirliva sum virkir. Tí verður í grannalondum okkara arbeitt nógv við at styrkja ráðgeving og finna fram, hvørji hugskot hava bestan møguleika og skapa karmar, sum hóska til tað. Fleiri staðir í USA verður harumframt stórur dentur lagdur á at hjálpa íverksetum við at lata virkið aftur áðrenn hallið er ov stórt. Hetta hevur tvinnar orsakir, fyri tað fyrsta, at fólk, ið taka váða til íverksetan ikki skulu koma í fíggjarligt óføri og ein staðfesting av at nógv av vakstrarvirkjunum eru bygd upp av íverksetum, sum hava eina ella fleiri miseydnaðar íverksetararoyndir í sínu søgu.

Her verður ofta arbeitt, serliga í tveimum løgum. Eitt fyri breiddina at tryggja yvirskipaðið íverksetarakor, soleiðis at tað er lokkandi at gerast íverkseti og hitt er at finna møguligu vakstraríverksetarnar og hjálpa hesum fram, tí tað eru hesi sum hava við sær størstu menningina, umseta mest pening og seta flest fólk í arbeiði. Mett verður, at tað er neyðugt at hava eina breidd fyri at kunna skapa eina íverksetaraelitu, sum skapar vakstrarvirkir.

### Íverksetaraskeið á háskúla

Eitt átak, at seta størri fokus á at betra um møguleikarnar hjá íverksetum er háskúlaskeiðið Evropaháskúlin á Kalø bjóðar saman við Fundamentor, sum Bogi Eliasen og Palle Højsholt standa fyri. Kunnandi fundur um skeiðið og kjak um íverksetan verður í Miðlahúsinum mikukvøldið kl. 19. Tiltakið er ókeypis.